# Leiðreglur um munnligar fyrispurningar

**Tingskipanin § 52, stk. 1-4:**
**§ 52.** Løgtingsformaðurin setir regluliga á dagsskrá: Munnligar fyrispurningar til løgmann ella landsstýrismenn.
*Stk. 2.* Á hesum fundum kunnu løgtingsmenn uttan loyvi Løgtingsins seta løgmanni ella landsstýrismanni stuttar munnligar fyrispurningar um almenn viðurskifti, sum eru stutt og nágreiniliga orðaðir, og sum teir í seinasta lagi dagin fyri hava boðað løgtingsformanninum og løgmanni ella landsstýrismanninum frá. Løgtingsformaðurin kann, um sami spurningur verður settur av fleiri tingmonnum, gera av, at spurningarnir verða viðgjørdir undir einum. Í slíkum føri fáa allir spyrjarar talutíð sum spyrjari.
*Stk. 3.* Løgmaður ella landsstýrismaður svarar so aftur munnliga á sama fundi, men kann eisini uttan aðra grundgeving biðja spyrjaran seta spurningin fram av nýggjum eftir reglunum um skrivligar fyrispurningar í § 53. Í hesum føri steðgar orðaskiftið beinanvegin.
*Stk. 4.* Á sama hátt kann løgtingsmaður á slíkum fundum seta nevndarformanni í løgtingsnevnd fyrispurning um, hvussu gongst at viðgera ávíst mál, sum beint er nevndini, men sum einki álit er latið í enn.

1. Spurningurin skal verða settur løgmanni ella landsstýrismanninum, sum varðar av málsøkinum.
2. Um spurningurin fevnir um fleiri málsøki, eiga 2 ella fleiri spurningar at verða settir.
3. Spurningur, sum tingmaður setir løgmanni ella landsstýrismanni, skal snúgva seg um almenn viðurskifti. Spurningur um privat viðurskifti hjá landsstýrismanni verður avvístur, hevur hann ikki almennan áhuga.
4. Hvørki spurningur ella viðmerkingar eiga at snúgva seg um einkultpersónar.
5. Spurningurin skal vera stutt og greitt orðaður.
6. Viðmerkingarnar eiga at vera stuttar og greiðar og nágreina sjálvan spurningin. Hetta merkir, at viðmerkingarnar ikki skulu greiða frá støðu spyrjarans til málið.
7. Spurningur og viðmerkingar mugu ikki vera longri enn, at spyrjarin fær sett hann fram innan ásettu talutíðina upp á 2 minuttir. Hetta merkir, at spurningurin saman við viðmerkingum í mesta lagi kann vera einar 25 til 30 reglur, skrivað í Times New Roman 12 við tí síðustødd, sum vanliga verður brúkt.
8. Samsvar skal vera millum tað, sum skrivliga verður sent løgmanni ella landsstýrismanninum, og tað, sum sett verður fram í tinginum.
9. Svarið frá løgmanni ella landsstýrismanninum eigur eisini at vera orðað stutt og greitt og skal kunna svarast innan ásettu talutíðina upp á 2 minuttir, t.e. sama longd sum spurningurin sí pkt. 7.
10. Um umsiting Løgtingsins heldur, at ein spurningur fellur uttanfyri § 52, stk. 1-4 í Tingskipanini, verður málið sent løgtingsformanninum til endaliga støðutakan.

Um so er, at spyrjari ikki heldur seg kunna halda seg innan hesar karmar, eigur hann at umhugsa at seta spurningin fram sum skrivligan fyrispurning. Sama ger seg galdandi, um løgmaður ella landsstýrismaður ikki heldur seg kunna svara innan ásettu talutíðina.

Spurningar skulu latast umsiting Løgtingsins teldutøkir í seinasta lagi kl. 9.30 dagin fyri, at munnligir fyrispurningar eru settir á skrá.

Samtykt á fundi í formansskapinum 3. august 2020

Jógvan á Lakjuni
formaður

/Johnhard Klettheyggj
stjóri